REYÐI KROSSUR

Fylgiskjal 2

Reyði Krossur
Stiðjagøta 6
100 Tórshavn

Tlf. +298 283630
redcross@redcross.fo

V-tal: 423254

Ummælissvar frá Reyða Krossi Føroya til uppskotið til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Reyði Krossur Føroya takkar fyri møguleikan at geva ummæli til uppskotið til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar. Vit fegnast um, at eitt lógargrundarlag nú verður lagt fyri einum øki, sum hevur havt stóran týdning fyri bæði flóttafólk og stovnar seinastu árini.

Síðani mai 2025 hevur Reyði Krossur Føroya rikið bústaðartilboðið í Pedda við Steinsgøtu og tikið sær av uppgávuni sum sosialur samskipari. Vit kenna tí veruleikan og avbjóðingarnar í skipanini væl, og okkara viðmerkingar byggja á hesar ítøkiligu royndir.

Yvirskipaðar viðmerkingar

Reyði Krossur Føroya tekur undir við lógaruppskotinum og grundhugsjónini at syrgja fyri einum tryggum og virðiligum bústaðartilboði til flóttafólk úr Ukraina, sum annars høvdu staðið uttan bústað.

Samstundis harmast vit um, at lógaruppskotið kemur so seint.

Síðan bústaðartilboðið í Pedda við Stein varð sett á stovn tíðliga á sumri 2025 hevur ógreiða framtíðin hjá bústaðartilboðnum skapt eina rúgvu av óvissu, serliga fyri flóttafólkini, sum hava búð har og livað í óvissu, men eisini fyri okkum í Reyða Krossi, sum framvegis ikki vita, um vit hava eitt starv at røkja har komandi ár.

Vit mæla tí til, at framtíðar avgerðir á hesum øki verða *betri fyrireikaðar*, so borgarar og starvsfólk ikki koma í slíka ótrygga støðu.

Flóttafólkini, sum eru í Føroyum, hava longu livað í fleiri ár við ótryggum bústaðarkørmum, ið ofta hava kravt, at tey flyta úr einum staði í annað upp til fleiri ferðir á einum ári. Slík støða hevur við sær bæði fíggjarligar og sálarligar avbjóðingar, serliga fyri børn og familjur, sum hava tørv á støðufesti fyri at klára at fóta sær í einum nýggjum landi. Tí fegnast vit um, at lógaruppskotið nú ger tað møguligt at skipa eina meira varandi og virðiliga skipan — og vit mæla til, at uppskotið verður samtykt og sett í verk sum skjótast.

Viðmerkingar til evni í lógaruppskotinum

Serreglur á almannaøkinum (§ 11)

Reyði Krossur Føroya fegnast um og tekur undir við at serreglurnar um rætt til barnaískoyti, møguleika fyri arbeiðsbúgving og virknisvenjing og víking frá sambúgvandi-regluni, sum annars hevur minkað um uppihaldsveitingar, verða settar í verk.

Vit síggja javnan, hvussu hesar avmarkingarnar hava gjørt tað torførari hjá flóttafólki at fóta sær í Føroyum, og vit meta, at hesar serreglur kunnu stuðla undir møguleikunum at fóta sær í føroyska samfelagnum og á føroyska arbeiðs- og bústaðarmarknaðinum.

§ 11, stk 3

Í viðmerkingunum s. 4 stendur at neyðugt er at víkja frá vanligu regluni í § 12 um sambúgvandi, soleiðis at burturriknu ukrainarnir sum meginregla ikki fáa eina lægri uppihaldsveiting, tá teir flyta inn í ein bústað saman við øðrum burturriknum ukrainum. Vit vilja vísa á at tað somuleiðis er neyðugt at víkja frá

REYÐI KROSSUR

Reyði Krossur
Stiðjagøta 6
100 Tórshavn

Tlf. +298 283630
redcross@redcross.fo

V-tal: 423254

vanligu reglunum um sambúgvandi, tá burturriknir ukrainar flyta inn í ein bústað saman við øðrum fólki, t.e. at teir leiga kamar í húsum við øðrum órelateraðum persónum

Sosialfaklig ráðgeving og ábyrgdarbýti (§ 10)

Reyði Krossur Føroya hevur higartil røkt uppgávuna sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústaðnum í Pedda við Steinsgøtu — eitt arbeiði, sum hevur fevnt um alt frá ráðgeving og konflikhandfaring til praktiska samskipan og bústaðarsýning.

Tó hevur tað ikki altíð verið greitt, hvør hevur endaliga ábyrgdina í truplum avgerðum — t.d. um krøvini til innflytan ella avgerðir um, nær fólk ikki kunnu vera búgvandi. Á fundi við Løgmálaráðið varð staðfest, at Reyði Krossur umsitur slíkar avgerðir, men at myndugleikarnir taka avgerðirnar. Tað er sera týdningarmikið, at slíkt verður greitt staðfest, tá nýggja skipanin grundað á hesa løgtingslóg kemur í gildi, so hvørki stovnar, starvsfólk ella búfólk eru í iva um ábyrgdarbýtið.

Reyði Krossur Føroya hevur boðað frá, at vit eru framvegis til reiðar at halda fram sum sosialur samskipari, so leingi stuðul og avtala fylgja við.

Tó mugu vit staðiliga vísa á, at seinur úrskurður um hetta í 2025 hevur havt ítøkiligar, neiligar avleiðingar fyri bæði starvsfólk hjá Reyða Krossi, og ikki minst fyri flóttafólkini, sum framvegis liva í ótolandi óvissu, og har summi eitt nú hava sæð seg noydd at flyta út í óhóskandi bústaðir.

Tað er eisini umráðandi at hava í huga, at flóttafólkini vita enn ikki, hvussu leingi tey hava uppihaldsloyvi og harvið kunnu vera verandi í Føroyum. Og eingin veit, nær ella hvussu kríggið í Ukraina endar.

Tí meta vit eisini, at tað er ongin orsøk at gera bústaðarstøðuna enn meira ótrygga, við at hava eina skipan, sum stendur til at fara úr gildi í 2028, uttan at hava møguleika at verða longd: í viðmerkingunum til § 13 stendur, at um uppihaldsloyvini hjá ukrainum verða galdandi eftir 1. januar 2028, "má ein nýggj løgtingslóg samtykkjast". Til hetta vilja vit viðmerkja, at tað átti at verið gjørligt at finna eina smidliga loysn til at leingja lógina, soleiðis at vit ikki koma at standa í somu støðu umaftur við óvissu um bústaðartrygdina hjá flóttafólki, sum hava uppihaldsloyvi í Føroyum.

Bráðfeingis bústaðirnir eru ikki fevndir av leigulógini (§ 5)

At bráðfeingis bústaðirnir ikki eru fevndir av leigulógini má ikki stilla búfólkini verri enn aðrar leigarar. Uppsagnartíðin frá Landsverki má vera rímilig og við nóg góðari freist, soleiðis at búfólkini ikki eru í vanda fyri at vera uppsøgd frá degi til dags.

Hinvegin eru vit samd í smidligari uppsagnartíð fyri búfólkini, soleiðis at tey skjótt kunnu flyta út, finna tey annan langtíðar bústað við stuttari innflytingarfreist.

Reglur um treytir fyri ávísing (§ 8)

Orsøkirnar fyri tørvi á bráðfeingis bústaði hava verið ymiskar, tó allar eins væl grundaðar. Fleiri, ið eru flutt inn á búfelagsskapin, vóru ávíst til fyribils bústaðir eftir komu til Føroya, og stóðu av hesi orsøk uttan bústað móti sumri. Onnur hava verið í ov dýrum bústøðum; ein familja er somikið sjúk av soppafongda annars langtíðarbústaðnum, og noyðast akutt at sleppa út; ein triðja samansett familja á 6 fólk flutti út í oktober, tá Pedda við Stein stóð til at lukka, í alt ov tronga íbúð, og noyðist nú at flyta innaftur – eisini hóast tey flyta inn aftur í óvissar umstøður og tíð, tá einki er greitt fyri komandi ár. Til felags hava familjurnar verið í somikið óhóskandi bústøðum ella staðið uttan bústað, og tí verið í vanda fyri heimloysi.

Reglurnar um treyt fyri ávísing mugu taka hædd fyri teimum ymisku og ofta kompleksu støðunum, ið burturriknu ukrainarnir kunnu vera í. Harumframt mugu reglurnar viðurkenna tað vanbýti (inequity), ið burturriknir ukrainarar eru fyri, tí tey eru flóttafólk og ofta mangla bæði netverk og málførleika í mun til aðrar íbúgvar í Føroyum.

REYÐI KROSSUR

LM-084/2025

Reyði Krossur
Stiðjagøta 6
100 Tórshavn

Tlf. +298 283630
redcross@redcross.fo

V-tal: 423254

Niðurstøða

Reyði Krossur Føroya:

- stuðlar lógaruppskotinum,
- fegnast um serreglurnar á almannaøkinum,
- og vil fegin halda fram at veita sosialfakligan stuðul og umsiting í bráðfeingis bústøðunum, um fígging og avtala koma uppá plass.

Tó mugu vit vísa á, at:

- uppskotið kemur alt ov seint,
- óvissan hevur verið óneyðuga stór og hevur ávirkað bæði búfólk og starvsfólk
- og at greiðar mannagongdir og langsiktað samskipan eru *neyðug* fyri at tryggja eina virðiliga og haldføra skipan frameftir.

Vit eru til reiðar at samstarva víðari við myndugleikar og stovnar fyri at tryggja, at flóttafólk úr Ukraina fáa virðilig lívskor og møguleikar í Føroyum – so leingi tørvur er á tí.